


**Nr. 21** ***13. oktobur 2024*** **84. árg.**

# Vitna um undurgerðir Harrans

*„Greinið fólkanna millum undurverk hans!“ Sálmur 96,3.*

Mær hevur ongantíð dámt, at fólk tosa so nógv um, hvat ið tey vóru, áðrenn tey gjørdust kristin! Tað var eitt skammiligt lív. Hin vísi fjalir skomm sína, sigur Bíblian. Harafturímóti eggjar Skriftin okkum til at siga frá **um allar Guds undurgerðir** (Sálm. 105,2). Men hvørki djevulin ella hálvlunkað kristin fólk harafturímóti vilja tað. Tey tosa forhánisliga um „sólskinssøgur“, og tað er mest sum bannað at siga frá um tey undrini, Gud ger í dag. Man tað vera, tí at tey sjálv vilja ræna æruna frá Gudi, ella eru tey so gjøgnumsúrgað av øllum tí negativa, sum vit hoyra um og lesa í fjølmiðlunum? Undir øllum umstøðum eru tey ólýðin móti Gudi og gera ikki tað, Bíblian vil hava okkum at siga.

Hvønn sunnudag **lesa** vit ta ápostólsku trúarjáttanina við andakt í kirkjuni; men tað er nú ikki heilt tað sama sum at **hava ápostólska trúgv**, somu trúgv sum ápostlarnir høvdu. Ein tóm trúarjáttan er hyklarí. Tað er ikki rætt at líta so ivingarsom at menniskjum, sum liva út trúnna! Tað nyttar so lítið at vísa á, at vit hava ta reinu Luthersku læruna, um lívsførslan ikki samsvarar.

At trúgva á Gud er ikki at spæla nakað eydnuspæl! Tað er tað mest natúrliga, sum finst. Gud svíkur ikki lyfti sítt: „Eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda,“ og „hvør tann, sum trýr á hann, skal ikki verða til skammar!“ Lat tað standa fast, at Gud er sannorðaður, og hvørt menniskja lygnari! Tað er hin roynda trúgvin, sum er kostiligari enn ektað gull!

Hvat fyri hugsanir hava nútíðar menniskju um Gud? „Smakka og kenn at Harrin er góður! Sælur er hann, sum søkir sær skýli hjá honum.“ Tí so skjótt sum ein syndari vendir um, er náði í yvirflóð at fáa! Lovaður veri Gud! Hetta umfatar eisini teg, sum lesur hetta! Latið okkum tala allastaðni um tey undrini, ið Harrin ger nú á døgum og soleiðis bera honum æru.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein umvending

Einaferð í 1960-árunum kom ein norðurírskur evangelistur til Føroya at tala. Hann kallaðist Willy Mullan. Hann hevði verið kriminellur fyrr. Hann hevði eina djúpa og grova rødd, og hetta gav boðskapi hansara eyka tyngd. Pápi hansara doyði, tá ið hann var lítil, og mamma hansara sat eftir við 14 børnum, so har var ógvuliga fátæksligt. Ikki so langt eftir tað, doyði mamman eisini, og eingin av systkjunum hjá Willy vildi taka sær av honum, so hann stóð púra einsamallur í verðini, tá ið hann var 14 ára gamal.

Hann kom í ringt vinalaga, og hann gjørdist ránsmaður. Einaferð hevði ein maður bjóðað honum á eitt møti. Hann lovaði at koma. Hann helt altíð orð, so hann fór avstað á møtið og setti seg aftast. Tá hoyrdi hann talaran lesa upp úr Bíbliuni: „Tí at komin er dagurin, hin stóri dagur vreiði teirra, og hvør er førur fyri at standast?“ Opb. 6,17.

Hann smeyg sær út, og einki hevði sum so havt nakra ávirkan á hann. Teir í harkaliðnum høvdu gjørt av at ræna ein banka. Willy var stratekurin í bólkinum. Tað vil siga, at hann roknaði alt gjølla út og legði alt til rættis. Hann fór so yvir til bankan. Har var ein stór fløta aftan fyri bankan. Har fór hann fyri at kunna rokna alt gjølla út. Tá ið hann hevði staðið har eina løtu og hugsað seg um, komu orðini, sum hann hevði hoyrt á møtinum, við veldigari kraft niður í hann: „Tí at komin er dagurin, hin stóri dagur vreiði teirra, og hvør er førur fyri at standast?“

Nú sannaðust orðini hjá Paulusi: „Legg tær ... eina við upplestrinum.“ (1. Tim. 4,13). Heitt verður á okkum, um at lesa upp úr Bíbliuni. Hví? Tí Guds orð eru livandi. Okkara orð eru deyð. Ofta halda vit, at vit kunnu sannføra fólk betri við okkara orðum. Men soleiðis hongur tað ikki saman. Tað einasta, hesin maður mintist, vóru Bíbliuorðini.

Hann fall á knæ har á grasvøllinum og fór at rópa til Guds um náði, og orðið sigur: „Eg rópi hart til Gud, ... og hann hoyrir meg.“ Sálm. 77,2 V.D. og „Náði Hansara varir til ævigar tíðir.“ Sálm. 100,5 V.D. Tað fekk hann sanniliga at uppliva. Hann varð settur í frælsi í einum nú, og hann gjørdist so hjartans glaður.

Hann sprakk út á vegin og gav seg í prát við tann fyrsta mannin, hann sá. „Tú, tú,“ segði hann, „hygg handa fløtan har yviri, har bleiv eg frelstur beint nú!!“ Maðurin var ikki trúgvandi, og hann helt, at Willy var svakur, og tí skumpaði hann hann frá sær.

So sá Willy ein annan mann. Hann rann yvir til hansara og segði: „Tú, tú, hygg handa fløtan har yviri, har bleiv eg frelstur beint nú!!“ Hetta var ein trúgvandi maður. Hann hálsfevndi Willy og segði: „Harrin havi lov, kæri bróðir.“

„Handa heilsanin gjørdi mær so gott,“ segði Mullan, „tí hann góðtók meg sum ein kristnan bróður.“ Og so fór Willy Mullan út at prædika um tann Harra og Frelsara, sum hevði gjørt so nógv fyri hann.

*Effie Campbell.*

# Fríi vitnisburðurin

*Fríi vitnisburðurin er sum ein lýsandi viti, og hann gevur meinigheitini ein frískleika. Í einum sangi hjá Fanny Crosby verður sungið so:*

***Kom, sig eitt orð um Jesus,***
***tín vin og Frelsara,***
***sig frá, sig frá um hvussu,***
***tú komst til hansara!***

***Kom, sig eitt orð um Jesus!***
***Vit styrkjast øll harvið;***
***eitt lítið orð um Jesus,***
***syng, vitna ella bið!***

Orðið vendir ikki tómt aftur, tað eiga vit lyfti um. Øll skulu eiga høvi til at vitna. Jesus sigur, at vit skulu vera hansara vitni. Har stendur einki um, at bara tey, sum duga so væl at málbera seg, skulu vitna, tvørturímóti.

Paulus sigur eisini: „Kristus sendi meg út at boða gleðiboðskapin, ikki í orðavísdómi...“ (1. Kor. 1,17). Tað skal gerast

so einfalt, at tú røkkur teimum, sum eru longst niðri. Tá ið tað verður so háfloygt og fínt, fært tú skjótt kensluna av, at tú hevur megnað alt hetta, og tá slóknar andin, tí Harrin stendur teimum hugmóðigu ímóti. (Ják. 4,6). Tað, sum lítið var fyri verðini, útvaldi Gud sær, (1. Kor. 1,27) tí hann hyggur at hjartanum.

Tann, sum bara fekk eina talent, skal hava loyvi at brúka hana, tí Gud kravdi eisini at fáa rentur frá honum. (Matt. 25,24–30) Tann, sum nógv hevur fingið litið til, frá honum verður kravt upp aftur meira. (Luk. 12,48)

Má Harrin gera tað so, at fríi vitnisburðurin ongantíð tagnar okkara millum, tí nógv eru vorðin frelst gjøgnum fría vitnisburðin.

*Effie Campbell.*

# Talið um øll undur hansara

*Sálm. 105,2*

Vit verða ámint um at tala um øll tey undur, ið Gud ger í dag. Tá ið fólk hoyra um sterk bønasvar, tá síggja tey, at Jesus er sera nær. Hann er ikki ein Frelsari, sum er staddur langt burturfrá, og at trúgvin á Jesus er ikki ein teori, men eitt samband við Lívsins Harra, okkara elskaða Frelsara.

**Tað eru tvey sløg av umvending:**

1. **Sólarris**. Tað eru tey, sum frá barni av hava fingið søguna um Jesus plantað inn í hjarta sítt. Hjá teimum veksur trúgvin so líðandi, so við og við.
2. **Jarðskjálvti**. Hetta eru tey, sum hava livað eitt hart lív úti í verðini, men so verða tey vakt. Tey sóu, hvussu tómt og innihaldsleyst tað lívið var, og tí vendu tey um, og tað hendi, sum ein jarðskjálvti.

*Effie Campbell.*

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 13. okt. | **Tekstur:** | Matt. 6,12; 18,21-35 | **Bíbliuorð:** | Ef. 4,32 |
| 20. okt. | **Tekstur:** | Matt. 6,13a; 4,1-11 | **Bíbliuorð:** | 2. Tess. 3,3 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 22** ***27. oktobur 2024*** **84. árg.**

# Takið ímóti signingini

*Sjónvarps-pastorurin Egil Svartdahl undirvísti á summarstevnuni 2022.*

**Aronittiska signingin stendur í 4. Mós. 6,24–26:**
„Harrin vælsigni teg og varðveiti teg!
Harrin lati andlit sítt lýsa yvir teg og veri tær náðigur!
Harrin lyfti upp ásjón sína yvir teg og gevi tær frið!“

Henda signingin er fyri øll og kann brúkast aðrastaðni enn í gudstænastuni. Egil segði, at hann brúkti hana heima. Áðrenn tey fimm børnini fóru frá húsum á morgni, rættu tey høvdið fram, so at pápin skuldi signa tey henda komandi dagin.

Tað eru so mong, sum stúra fyri degnum, so mong, sum ivast í, um tey orka at koma upp úr songini. Fyri trimum árum síðani byrjaðu vit tí „Plussord“ á Instagram og Facebook. Nú tann 23. juli 2022 hava vit gjørt tað í 1.000 dagar á rað. Vit hava 60.000 fastar fylgjarar, nærum 20 mill. vitja síðuna, og 150.000 deila. Hvønn dag lýsa vit signingina. Hvønn dag tekna vit eitt stórt smílandi fjes (smiley) á himmalin, so at tey skulu vita, at „andlit Harrans lýsir yvir meg eisini henda dagin“. Tá kemur andlitið nær, og tað verður persónligt.

Tú sást ikki Gud, tá ið tú vart í onkrari serligari støðu. Men so gingu nøkur ár. So hugsaði tú: „Tú vart har, Gud! Eg sá teg ikki tá, men eg síggi og skilji tað nú. Tú vart har!“

Ein dagin ringdi Fredrik, ein av sonum mínum, úr einari kaffistovu í Oslo. Hann hevði frí. Eg hugsaði: „Hvat vil hann nú hava?“ So sigur hann: „Eg vil bara so fegin hoyra rødd tína, pápi.“ Tá fekk eg tár í eyguni.

Bønarlívið hjá summum er bara at biðja um eina gávu ella eina tænastu. Men tá er bønarlívið ov smalt! Viðhvørt skuldu vit bara sagt: „Eg vil bara vera í nánd av tær. Eg havi ikki brúk fyri nøkrum. Tær nýtist ikki at siga nakað. Eg vil bara sita her. Eg søki teg fyri tína egnu skyld."

Í Gamla Testamenti bar ikki til at síggja Gud andlit til andlits. Men so ein dagin sluppu vit at síggja hann. Orðið varð hold, og Gud kom til okkara gjøgnum Jesus sum Immanuel; tað merkir: Gud við okkum. (Jóh. 1,14 og Matt. 1,23). Brádliga sluppu vit at síggja andlit hansara. Um tú ivast í, um Gud er nær, so skalt tú hyggja at Jesusi Kristi í krubbuni í Betlehem. Tá veitst tú, at hann heldur tað, hann hevur lovað.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein vitnisburður frá krígsárunum

*Svein Lindset, sum er bønarleiðari*
*á Visjon Norge, vitnaði nú eitt kvøldið:*

„Abbi bleiv tikin undir krígnum, tí hann hevði fjalt fólk úr mótstøðurørsluni í hoyggjhúsi sínum. Hann varð settur í eitt varðhald í Møllergata 19. Einir tríggir aðrir vóru eisini inni í sama rúminum. Har stóð eitt træborð, og fangar, sum høvdu verið í hesum rúmi, høvdu grivið ymiskt niður í borðið.

Abbi var trúgvandi maður, hann var djarvur og fjaldi ikki trúgv sína. Hann bað borðbøn og tosaði opið um trúgv sína. Tað vóru ikki allir, sum vóru samdir við hann. Fangarnir høvdu hvør sítt krúss og eina skeið. Krússið varð brúkt til suppu og te. Tvørtur um borðið hevði abbi sæð, at okkurt var grivið niðurí, men hann dugdi ikki at lesa, hvat ið har stóð. Borðið var skitið og plettut av tevatni. Heldur ikki var lætt at grava við einari teskeið, so tað var ikki løgið, at tað var heldur ólesandi. Men so ein dagin hevði abbi loyst gátuna. Har stóð: „Eg seti mítt álit til tín, Harri." (Sálm. 31,15).

Ein dagin varð ein nýggjur fangi skumpaður inn í henda klivan. Hann var mótstøðumaður, tí varð hann tikin. Men hann var eisini gudloysingur, ateist. Dagin eftir varð hann tikin til forhoyr. Hann visti, at teir fóru at pína seg og fara ógvisliga fram, tí hann hevði gjørt av, at hann vildi ikki slatra ella siga, hvør annar var í mótstøðubólkinum.

Tá ið hann var farin út um hurðina, sigur abbin: „Nú mugu vit fara í bøn fyri hann.“ Teir fullu so á knæ, og abbin sigur: „Eg seti mítt álit til tín, Harri,“ og síðani bað hann fyri manninum. Hetta gjørdi hann tríggjar ferðir. Uttan fyri dyrnar stóð fangavørðurin við koyrli og skuldi sláa neyðardýrið. Hann rætti armin upp, men fekk ikki sligið. Armurin peiggjaði bara beint upp í loft. Hann tók armin niður og royndi tvær ferðir afturat, men sama skilið. So rendi hann mannin inn aftur í klivan.

Har fekk hesin gudloysingurin at vita, at vinmenninir høvdu biðið fyri sær og játta trúgv sína á Gud við hesum skriftstaðnum: „Eg seti mítt álit til tín, Harri.“ Tá fall hann niður á síni knø og gav seg yvir til Harran og bleiv herliga frelstur. Stutt eftir kom frælsi, tí hetta var í 1945.

*Effie Campbell.*

# Hann á tekjuni

*Uffe Nissen*

„Nóa og synir hans, kona hans og sonakonur hans við honum fóru tá inn í ørkina undan vatnflóðini ... Og Harrin læt aftur eftir honum.“ (1. Mós. 7,7.16) Tað vóru óivað mong á Nóa døgum, sum høvdu sín máta at sleppa undan vatnflóðini. Men bara Nóa og hansara familja vórðu frelst, av tí at tey fóru inn í ørkina eftir treytum Harrans. „Og Harrin læt aftur eftir teimum.“

Tey fóru ígjøgnum harðveðursdagar og nætur, men mitt í øllum kendu tey ein ómetaligan tryggleika. Harrin hevði sjálvur latið aftur eftir teimum. Hann hevði tikið ábyrgdina á seg.

Jødarnir hava knýtt eina søgn upp í frágreiðingina um flóðina miklu. Hon er um ein mann, sum vildi frelsast eftir sínum egnu treytum. Hann kallaðist Irad, og hann hevði sína egnu klóku ætlan í kvittanum. Hann vildi ikki kvetta við verðina, men um nú Nóa kortini skuldi havt rætt, so ætlaði hann at leita sær friðskjól á tekjuni á ørkini. Har innrættaði hann seg í góðari trúgv. Men sum frá leið fekk hann ikki hildið sær føstum á tekjuni. Har var hvørki lívd ella føði, hann doyði saman við øllum hinum. **Uppi á** ørkini, ikki **inni í** henni! Mong vilja frelsast upp á tann mátan, soleiðis eitt sindur í nánd av øllum, hvørki køld ella heit. Men tað riggar ikki í ódnarveðri

– tá fellur tað hálva hjartað og tað flógva sinnið saman við verðini. Frelsan er, at **Harrin letur aftur eftir okkum!**

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvar er eydnan?

Eg las í einum blaði um eina familju, sum var flutt til eitt av londunum í Persaflógvanum. Maðurin undraðist á ógvisliga stættamunin, sum ráddi har. Øðrumegin hevur tú tær stóru sølumiðstøðirnar og tað tóma og oyðslusama lívið millum fólk. Hinumegin hevur tú líðingarnar hjá teimum fátæku, sum arbeiða hart fyri lágar lønir, tey einsomu og mótlítlu.

Men innantóm fólk rennur tú teg í allastaðni. Eydnan liggur ikki í tí, tú eigur, men hvørjum tú trýrt á. Fólk blaka burtur tíðina og leita eftir gleðini á nýggjum støðum og í ognum. Men tey mistaka seg skammiliga. Og so liggur loysnin beint framman fyri nøsini á teimum. Í Jóh. 6,35 sigur Jesus: „Eg eri lívsins breyð. Tann, sum kemur til mín, skal ikki hungra, og tann, sum á meg trýr, skal aldri tysta."

Jesus boðar her frá, at hann er tann, sum stillar lívshungurin og lívstostan. Vit hava brúk fyri Jesusi – ikki bara tí vit eru syndarar, og hann hevur goldið fyri allar heimsins syndir og tikið alt tað upp á seg – vit hava eisini brúk fyri honum sum menniskju. Uttan Kristus manglar menniskjalívið tann lutin, sum gevur lívinum innihald og meining.

*Effie Campbell.*

---

**Kvinnur, reisið tykkum.** Verið ein Ester. Hon fór í forbøn fyri landi sínum og bjargaði tí. Job fekk dupult so nógv aftur, tá ið hann fór í forbøn fyri vinum sínum (Job 42,10). **Double for the trouble,** sum bretar siga.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 27. sept. | **Tekstur:** | 1 Kong. 18,1-46 Opb. 4,11 | **Bíbliuorð:** | Opb. 19,6b-7a |
| 3. nov. | **Tekstur:** | *Allahalgannadagur*: Opb. 21,1-5 | **Bíbliuorð:** | Opb. 21,5 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74